Samsigling um Leirvíksfjørð

Tvey skip røkja nú flutningin um Leirvíksfjørð. Umframt Dúgvuna er Sam eisini settur í rutu nakrar túrar um dagin. Hann byrjaði týsmorgunin

SAMFERÐSLA
Edvard Joensen

Sam er farin at røkja siglingina um Leirvíksfjørð saman við Dúgvuni. Fyrsti túrurin var týsmorgunin

Mynd: Edvard Joensen

Leirvík: Sam er nú farin at hjálpa Dúgvuni við flutninginum um Leirvíksfjørð. Alment byrjaði siglingin í gjár, men hann tjóvstartaði longu mánakvøldið.

Strandfaraskip Landsins hava nú tvey skip á Leirvíksfirði. Talan er um eitt politiskt ynski, sum nú er uppfylt, sigur Poul Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðari á Strandfaraskipum Landsins.

Tað hevur leingi verið sera trupult at ferðast um Leirvíksfjørð. Serliga fyrrapart, tá tunga ferðslan til og úr Klaksvík hevur verið upp á tað mesta.

– Tað var hendan fløskuhálsin, vit vildu sleppa av við, og tí vórðu játtðair pengar til eitt skip afturat at sigla um Leirvíksfjørð, sigur Poul Jákup Thomsen.

Ymsar ætlanir skuldu fáast at sampakka, áðrenn til bar at seta eitt skip afturat í siglingina, sigur hann, men nú er loysn so fingin á hesum við at seta Sam í sigling. Eisini er manning fingin. Tað eru menn, sum fluttir eru aðarstaðani frá úr reiðarínum, ið nú sigla við Sam.

Klokkan er knappliga hálvgum níggju. Tað er týsmorgun triði september, og Sam skal sigla fyrsta regluliga túrin av Leirvík um nakrar fáar minuttir.

Hann liggur við ferjuleguna, og ein einsamallur persónbilur stendur á ferjubakkanum og bíðar eftir at sleppa við.

Einir fýra mans, sum allir eru í eyðkennisbúnum hjá Strandfaraskipum Landsins, standa á skráanum. Teir bíða eftir, at siglast skal.

Teir greiða frá, at hóast hetta er fyrsti túrurin eftir almennu ferðaætlanini, hava teir longu verið í sving.

– Tað hevði staðið á í gjár, greiðir ein teirra frá, um vit ikki komu framvið. Dúgvan hevði eitthvørt smávegis brek, so vit tóku yvir og fluttu nakrar bilar um Fjørðin.

Sam var farin ein túr líkasum at royna umhvørvið, áðrenn hann skuldi byrja siglingina. Og tað endaði so við, at hann tók nakrar bilar við til Klaksvíkar.

Beint fyri fráfaringartíð kemur ein bilur koyrandi út eftir ferjubakkanum. Steðgar skamt frá skipinum og út kemur skundmikil maður við pappírsposum í hondini.

Hetta er fólkaflutningsleiðarin, sum kemur at bjóða manningin á Sam vælkomnum við rundstykkjum og onkrum at leggja uppá.

Hann letur væl at, Poul Jákup Thomsen. Ferjuskráarnir eru broyttir eitt lítið sindur, bæði her í Leirvík og í Klaksvík, so Sam eisini kann brúka teir. Tað hava smiðjumenn norðan úr Sundi gjørt í eini handavend, greiðir hann frá.

So ringir fartelefonin í lummanum hjá honum, og okkara samrøða verður kvett av.

– Eg havi slitið fleiri fartelefonir upp, sigur Poul Jákup, í tí hann tekur telefonina úr lummanum og svarar.

Eina løtu tosar hann og hevur so hug at venda aftur til okkara samrøðu. Men áðrenn hann er komin so langt, rópar skiparin úr stýrihúsrútinum, at nú er telefon til hansara har umborð.

So har gerst einki. Hann fer skundandi umborð at tosa í telefon. Manningin fær bíðandi bilin umvborð, og Sam loysir á sínum fyrsta túri, sambært ferðaætlanini, um Leirvíksfjørð.

Starvsvenjing

Á tíðindafundi hjá Smyril Line mánadagin, hittust fýra floksfelagar, sum allar vóru í praktikk hjá ymsum fjølmiðlum

TÍÐINDAFUNDUR
Brynhild H. Reinert og Emma Hansen, praktikantar

Fýra praktikantar av Felagsskúlanum á Oyrarbakka hittust á tíðindafundi hjá Smyril Line mánamorgunin. Eirika Ellingsgaard, uttast vinstrumegin, er í praktikk í Sjónvarpinum. Erna Joensen er í Útvarpinum, meðan Brynhild H. Reinert og Emma Hansen eru í praktikk á Sosialinum

Mynd: Edvard Joensen

Annan september 2002 fór 9. flokkur í Felagsskúlanum á Oyrabakka í starvsvenjing. Tað var ymist, hvar næmingarnir valdu at fara. Nøkur valdu at fara til Sosialin onnur til Sjónvarp Føroya og Útvarp Føroya.

Mánadagin hevði Smyril Line tíðindarfund. Á hesum fundi vóru fýra praktikantar til staðar. Tveir av Sosialinum, ein úr Sjónvarpinum og ein úr Útvarpinum. Allar av Felagsskúlanum á Oyrabakka.

Ahugavert var at sita og lurta, hvussu leikur fór fram. Ferðafaldarar vóru lagdir fram og ymiskt annað viðvíkjandi nýggju Norrønu. Aftaná var møguleiki at seta stjórunum á Smyril Line, Óla Hammer og Jóannesi á Váli, spurningar.

Kanóntilboð

Nú Norrøna aftur er farin undir vetrarsiglingina, hevur Smyril Line nøkur góð tilboð til skúlaflokkar. Siglingin byrjar í september mánaði og endar í mai. Til ber at fara til Hetlands í 3 - 10 dagar, og gista á vallaraheimi. Tað ber eisini til at fara útferðir ymsastaðni í Hetlandi. Hesar útferðir fáast í lag við at seta seg í samband við skrivstovuna hjá Smyril Line. Siglt verður eisini til Danmarkar í sama tíðarskeiði.

Smyril Line bjóðar ikki bara skúlaflokkum út at ferðast bíðliga, men eisini arbeiðspláss, feløg og bindiklubbar og so framvegis, fáa nú eisini høvi til tess. Henda Shetlands Cruies ferð er til Lerwick. Í Lerwick verður gist á fyrsta floks hotelli í tvær nætur. Farið verður av Havnini hóskvøld kl. 22.00, og komið verður aftur á Havnina mánamorgum kl. 06.00. Treytin fyri tilboðnum er, at fleiri enn 10 eru í hvørjum ferðalagi.

Bussleiðin 3.5 milliónir bíligari

Býráðið í Havn fer nú undir samráðingar við Mouritsens Bussar og Gundurs Bussar um busskoyring í Havn. Eftir tilboðunum verður koyringin 3.5 millónir krónur bíligari at reka um árið

BUSSLEIÐIN
Eirikur Lindenskov

Eftir fyrsta februar komandi verður eingin bussur yngri enn trý ár. Allir verða sokallaðir »lágbussar«, har rørslutarnað fólk og fólk við barnavognum hava lættari við at ferðast

Mynd: Jens Kristian Vang

Tekniska nevnd hjá Tórshavnar býráð mælir býráðnum til at taka upp samráðingar við P/F Mouritsen Bussar um rakstur av leið 1, 2 og 3 og við sp/F Gundurs Bussar um rakstur av leið 4/4x, sum er kollfjarðarleiðin og av skúlaleiðini. Nevndin hevur eisini samtykt í øðrum lagi at mæla til at fara undir samráðingar við Sp/F Gunnleifs Bussar um rakstur av øllum leiðunum.

Við verandi sáttmálum, sum fara úr gildi 1. februar komandi, er árliga gjaldið fyri busskoyringina 14.172.000 kronur, tá er skúlabarnakoyringin ikki við.

Eftir at koyringin er boðin út, verður árliga gjaldið til koyringina sambært tilboðunum umleið 11.380.000 kr, tá er skúlabarnakoyringin í Kollafirði við. Gjaldið fyri busskoyringina verður sostætt umeið 3,5 milliónir krónur minni um árið.

Býráðið beyð út koyringina hjá Bussleiðini alment í nuni í ár, og vórðu tilboðini latin upp 15. august. Tá høvdu 13 biðið um útbjóðingartilfarið, og av teimum lóti sjey inn tilboð til lisitasjónina. Teir vóru:

SP/F undir stovnan v/Una Mortensen
SP/F Gundurs Bussar
Bergur Johannesen
SP/F Hallurs Bussar undir stovnan
SP/F ABS-Transport
P/F Mouritsens Bussar

Býráðið setti ein bólk, sum hevur gjørt álit til politiska viðgerð.

Býráðið hevur roknað við hesum leiðum:

Leið 1, 2 og 3, sum er koyring í Havn. Hesar koyra mánadag til fríggjadag frá kl uml. 6:30 til kl 23. Leygardag verður koyrt millum kl 7 og 17, og sunnudag verður koyrt millum kl 10 og 17.

Leið 4 og 4x eru leiðirnar millum Havnina, Kaldbak og Kollafjørð. Hesar koyra mánadag til fríggjadag frá kl 7 til 20:30. Leygardag verður koyrt millum 9 og 17, og sunnudag koyra hesar leiðir ikki.

Skúlabarnakoyringin í Kollafirði og Kaldbak koyrir eftir ferðaætlan, sum verður gjárd í samráð við skúlarnar í Kollafirði, Kaldbak og Eysturskúlan.

Býráðið sigur, at allar leiðirnar eru endurskoðaðar. Leið 6 er niðurlogd. Í staðin koyri rleið 1 út á Hamaran á Argjum. Leið 4 og 5 eru lagdar saman til leið 4 og 4/x. leygardag verður seinasti túrur koyrdur uml kl 17 í mun til umleið leygarkvøld kl 23 eftir galdandi ferðaætlan.

Sjúrður Olsen, formaður í Teknisku Nevnd:

Bíligari at reka og flunkandi nýggir bussar

Formaðurin í Teknisku nevnd í Tórshavnar býráð er fegin um nýggju loysnina við Bussleiðini, sum verður effektivari, bíligari og umhvørvisvinarligari

BUSSLEIÐIN
Eirikur Lindenskov

– Koyringin verður effektivari, meira verður koyrt mitt í viku. Bussarnir verða allir nýggjari, tann elsti verður umleið trý ár. Allir bussarnir verða væl egnaðir til flutning av rørslutarnaðum fólki, allir eru lágbussar, og so verður Bussleiðin 3,7 millónir bíligari at gera.

Hetta sigur Sjúrður Olsen, formaður í Teknisku nevnd hjá Tórshavnar Býráð, tá vit biða hann siga okkum onkrar av fyrimununum, ið fáast kunnu við nýggja háttinum at bjóða út Bussleiðina í Havn.

Sjúrður Olsen sigur, at hetta er fyrstu ferð, at roynt hevur verið at bjóðað út koyringina á hendan hátt.

– Fyrr hevur býráðið altíð samráðst seg til rættis við teir, ið hava rikið Bussleiðina. Tá hava sáttmálar verið gjørdir í eitt fimm ára skeið ella so. Nú hava vit so valt at bjóðað leiðirnar út, og vit væntaðu sætt at siga, at tað fór at verða dýrari, tí vit settu eisini krøv um nýggjar bussar, sum eisini skuldu vera umhvørvisvinarligir, sigur hann.

Sjúrður Olsen sigur, at Tekniska nevnd hevur samtykt at mæla býráðnum til, at samráðingar verða tiknar upp við Mouritsens Bussar og Gundurs Bussar. Hóast endaliga avgerðin ikki er tikin, so verður hetta uttan iva endaliga loysnin, sigur hann – uttan so, at prísirnir hækka munandi undir samráðingunum.

Nevndin samtykti eisini í aðru atløgu at samráðast við Gunnleifs Bussar. Tilboðið frá teimum var eina millión krónur hægri.

– Tað var mest fyri at sleppa frá at fáa málið umaftur til politiska viðgerð, um tað skuldi hent, at tilboðið frá Mouritsens Bussum hækkaði munandi, sigur Sjúrður Olsen.

Tveir av teimum, sum hava rikið Bussleiðina nógvu seinastu árini, Sámal Bláhamar og Arne Berg, hava ikki boðið upp á Bussleiðina aftur. Gunnleif Danielsen, sum eisini hevur rikið partar av Bussleiðini øll árini, sleppur eftir øllum at døma ikki at halda fra.

Men busseigararnir verða kortini ikki við sviðusoð, sigur Sjúrður Olsen, tí býráðið hevur bundið seg til at keypa nýggjastu bussarnar.

– Talan er um í alt sjey bussar, sum vit yvirtaka. Men teir verða seldir viðari til teir, sum nú koma at reka Bussleiðina, hetta er alt avtalað frammanundan, sigur Sjúrður Olsen, sum letur ser væl at nýggju loysnini.

– Nú verða allir bussarnir flunkandi nýggir. Koyringin verður effektivari tá mest er brúk fyri henni mitt í viku, sigur hann. Býráðið hevur gjørt mátingar av, hvussu nógv Bussleiðin verður brúkt og nær. Koyringin leygardag verður skerd, men tá verður hon sera lítið brúkt, sigur Sjúrður Olsen at enda.

Leivur Hansen, limur í Teknisku nevnd:

Bussleiðin er ikki nóg góð tænasta

Meirilutin í Tórshavnar Býráð er ikki sinnaður at menna Bussleiðina, so hon gerst eitt veruligt alternativ. Í staðin skal hon rekast á sama støði næstu sjey árini, samstundis sum bilferðslan veksur, trýstið á vegirnar veksur og tørvurin á parkeringsplássum veksur, sigur Leivur Hansen, sum skjýtur upp, at spardu milliónirnar verða brúktar til tess at menna Bussleiðina

BUSSLEIÐIN
Eirikur Lindenskov

– Tá útgangsstøðið er, at tað skal kosta minni, og at tað skal koyrast minni, so fæst einki skilagott burtur. Tað sigur Leivur Hansen, sum umboðar minnilutan, Tjóðveldisflokkin og Javnaðarflokkin, í Teknisku nevnd hjá Tórshavnar Býráð.

Leivur Hansen sigur, at hann á fundinum í teknisku nevnd mánakvøldið segði, at hann ikki kundi taka støðu á fundinum, men at hann fór at koma við einum tilmæli á fíggjarnevndarfundinum, sum vera skuldi í gjár.

Leivur Hansen tekur als ikki undir við meirilutanum, Sambandsflokkinum og Fólkaflokkinum.

– Teir, sum hava bjóðað, hava sjálvandi bjóðað eftir teimum kørmum, sum býráðið hevur givið teimum av bjóða eftir. Her var endamálið at spara pengar, og at koyrast skuldi minni. Tað, sum nú fæst burtur úr er, at tænastan verður verri, og hesum kunnu vit ikki taka undir við, sigur Leivur Hansen.

Í tilmæli sínum til fíggjarnevndina fer Leivur Hansen at skjóta upp, at tær 3,5 milliónir krónurnar, sum ætlanin er at spara, ístaðin skulu brúkast til at menna Bussleiðina, so hon verður eitt veruligt tilboð til borgararnar.

Leivur Hansen er ikki sørt óttafullur um, at býráðið ætlar at gera ein sjey ára sáttmála, har bara »smávegis broytingar« kunnu gera.

– Hetta líkist svartasta ongum. Vit síggja hvønn dag, hvussu ferðslan økist í býnum, tað verður trengri á vegunum, tørvurin á parkeringsplássum økist, og útlátið frá bilunum økist sjálvandi samsvarandi. Hetta er als ikki í tráð við tað, sum í hesum døgum fer fram í Suðurafrika, har vit hava sent okkara umhvørvisráðharra at røða við heimsins tjóðir um burðardygga menning, og hetta er als ikki í tráð við andan í Agenda 21-ætlanini, sum leggur upp til, at vit í øllum lutum taka hædd fyri umhvørvinum. Hetta er beint øvugt tí, ið allar aðrar heimsins tjóðir gera, har tey fáa kollektivu ferðsluna at gerast eitt veruligt tilboð, sum kann bæsa nógvu bilferðsluni, sigur Leivur Hansen.

Minnilutaumboðið í teknisku nevnd heldur, at vit í staðin áttu at ment Bussleiðina soleiðis, at hon koyrdi tríggjar ferðir um tíman í meldurtíðini. Um so var, so gjørdist Bussleiðin eitt veruligt tilboð, sum nógv fleiri borgarar kundu fingið gagn av, og sum tí kastaði enn fleiri pengar av sær, enn tær tríggjar milliónirnar, ið Bussleiðin hevur í inntøku árliga.

– Vit mugu gera okkum greitt, at hetta er ein tænasta – ein tænasta, ið kostar. Gera vit einki við at menna hana, so setur tað okkum onnur krøv. Vit noyðast tá at gera stór parkeringspláss í býnum til stóra trýstið av bilferðsluni, sum bara fer at økjast. Vit mugu gera nýggjar vegir, og vit mugu samstundis staðfesta, at umhvørvið harvið verður dálkað enn meira, sigur Leivur Hansen.

– Bussleiðin er ikki eitt veruligt alternartiv, og tað verður hon heldur ikki næstu sjey árini. Tað er stórt spell, at meirilutin í Tórshavnar Byráð ikki er sinnaður at menna Bussleiðina munadygt næstu árini, heldur hann.